# Myndin er Føroyar

**Hóast Selma Mikladal hevur ferðast nógv, og hóast hon hevur búð í hjartanum av Keypmannahavn síðani miðskeiðis í 70-unum, so eru motivini, hon málar, føroysk**

**MÁLNINGALIST**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Eg havi altíð fingist við at mála. Men tað hevur mest verið til »húsbrúk«, og tað er ikki fyrr enn seinastu 5-6 árini, at veruliga er farin at mála í størri stíli, sigur Selma Mikladal.

Hon hevur komandi dagarnar framsýning í Galerie Focus. Hon fer at sýna fram 25 málningar, ein blanding millum naturalismu og abstrakt.

- Eg byrjaði helst meiri við naturalistiskum málningum og havi síðani flutt meg yvir í tað meiri abstrakta, sigur Selma Mikladal, sum helt sína fyrstu málningaframsýning í Føroyahúsunum í Keypmanahavn í 2005.

Síðani tá hevur hon sýnt fram ymsastaðni, eitt nú í samstarvi við Marionnu Norðoy í Galarie Focus í 2006.

Hon hevur myndlistina sum eitt ítriv, men síðani børnini gjørdust vaksin, hevur hon havt nógv betri stundir til at mála, so hetta er hennara fremsta frítíðarítriv við síðuna av starvinum sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Til tess at betra um umstøðurnar at mála – og at sýna fram – hava hon og maðurin keypt eitt verkstað í Keypmannahavn, har hon kann arbeiða við málningalistini,og har hon eisini kann skipa fyri framsýningum.

Selma Mikladal hevur síðani miðskeiðis í 70-árunum búð í hjartanum av Keypmannahavn, men hvørki hetta, ella ferðing hennara til serliga Grønlands, hava køvt nakað av kærleikanum til Føroyar, sum altíð hevur verið hennara íblástur við sínum sterka grøna liti.

So Føroyar er motivið hjá Selmu Mikladal á hesari framsýningini, bæði hennara barndómsumhvørvi í Klaksvík, eins væl og onnur og kend motivir kring oyggjarnar.

Ferniseringin verður fríggjadagin 1. august klokkan 16 til 18, og annars er framsýningin opin í Galerie Focus, Gríms Kambansgøta 20, frá 1. til 13. august, týsdag til fríggjadag klokkan 15 til 18 og leygardag klokkan 16 til 18.



*Selma Mikladal er fødd í Klaksvík í 1954, og hevur av álvara fingist við málningalist seinastu 5-6 árini.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin upp í ein strúk av eystri. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar. men seinnapartin regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 34 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 34 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ


**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga vestureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.


**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Bretsku Oyggjunum fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer vestureftir

## HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰ – 20/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰ – 20/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 68 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli Mánin longst frá jørðini
25. juli Seinna kvarter
30. juli Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. juli | 0:27 | 12:52 | 11:52 | - | - | 12:07 | 2:27 | 14:52 | 3:27 | 15:52 | 11:07 | 23:54 | 10:07 | 22:54 | 0:42 | 13:07 | 1:42 | 14:07 | 0:12 | 12:37 | 1:27 | 13:52 |
| 26. juli | 1:39 | 14:04 | 0:39 | 13:04 | 0:54 | 13:19 | 3:39 | 16:04 | 4:39 | 17:04 | - | 12:19 | 11:19 | 23:45 | 1:54 | 14:19 | 2:54 | 15:19 | 1:24 | 13:49 | 2:39 | 15:04 |
| 27. juli | 2:30 | 14:54 | 1:30 | 13:54 | 1:45 | 14:09 | 4:30 | 16:54 | 5:30 | 17:54 | 0:45 | 13:09 | - | 12:09 | 2:45 | 15:09 | 3:45 | 16:09 | 2:15 | 14:39 | 3:30 | 15:54 |
| 28. juli | 3:24 | 15:50 | 2:24 | 14:50 | 2:39 | 15:05 | 5:24 | 17:50 | 6:24 | 18:50 | 1:39 | 14:05 | 0:39 | 13:05 | 3:39 | 16:05 | 4:39 | 17:05 | 3:09 | 15:35 | 4:24 | 16:50 |
| 29. juli | 4:19 | 16:50 | 3:19 | 15:50 | 3:34 | 16:05 | 6:19 | 18:50 | 7:19 | 19:50 | 2:34 | 15:05 | 1:34 | 14:05 | 4:34 | 17:05 | 5:34 | 18:05 | 4:04 | 16:35 | 5:19 | 17:50 |

Lesið Sosialin